# Nú verður nógv bíligari at ferðast við Strandferðsluni

**Nú verður munandi bíligari at ferðast við skipunum hjá strandferðsluni, bæði hjá ferðafólki til gongu og fyri ferðafólk í bilum**




*Tað skal ikki koma óvart á nakran, vissi tað skjótt verður næstan helvtina so dýrt at sigla við Smyrli*

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður tað skjótt munandi bíligari at ferðast við skipunum hjá Strandferðsluni.

Og tað verður bæði galdandi fyri ferðafólk til gongu og fyri ferðafólk við bilum.

Á fíggjarlógini fyri í ár fekk Strandferðslan fimm milliónir, sum vórðu markaðar til at lække prísin á ferðaseðlum fyri.

Hetta eru eini 20% av inntøkunum hjá Strandferðsluni. Tað merkir, at sum heild fer tað at vera 20% bíligari at ferðast.

Men landsstýrið ætlar, at tað skal verða nógv bíligari enn so.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, sigur, at ætlanin er ikki at lække prísirnar fyrr enn fram ímóti sumri, kanska í mai mánaði.

Men afturfyri er so ætlanin at høgga rættiliga nógv av prísinum tá.

Hann sigur, at skal lækkingin javnast yvir alt árið, ger tað ikki tann heilt stóra munin. Men verður bíðað til longur út á árið, verður lækkingin tvær ferðir so stór, so tað fer at merkjast munandi betri.

Men so er eisini ætlanin at varðveita somu, lágu prísir frameftir. Tað merkir, at Strandferðslan skal hava uppaftur meiri pengar næsta ár.

- Vit fara at brúka hesa næstu tíðina at finna útav, akkurát, hvussu prísirnir skulu lækka, sigur hann.

**Munandi príslækking**

Hann sigur, at eitt, sum tey skulu finna útav, er, um allir prísir skulu lækka eins nógv, ella um munur skal vera á lækkingunum. Ein annar spurningur at taka støðu til, verður, hvussu góðar og nógvar avsláttarskipanir skulu verða framyvir.

Av tí sama kann Jacob Vestergaard heldur ikki siga, hvussu nógv teir ymisku prísirnir fara at lække.

Men fara prísirnir at lække eini 40-50%, skal tað ikki undra nakran.

- Tað eru lækkingar í hesi støddini, eg hugsi mær at seta í verk, sigur Jacob Vestgergaard.

Hann sigur, at samgongan hevur arbeitt við tølum, sum siga, at framyvir skal ein ferðaseðil aftur og fram kosta einar 50 krónur tilsamans og ein ferðaseðil aftur og fram við bili skal kosta einar 100 krónur tilsamans. Men tá skal tað ikki gera mun, hvussu nógv fólk eru í bilinum.

- Tað verður mett at kosta einar 18 milliónir um árið, ella níggju milliónir fyri hálvárið. Men nú fekk Strandferðslan so fimm milliónir fyri alt árið og tað er gott helvtin av tí.

-Tað røkkur so neyvan til at lække prísirnar so nógv, sum samgongan hevur ætlað. Men verður lækkingin sett í verk frá í mai, røkkur tað í øllum, førum til at lække prísirnar munandi, so at teir kanska verða eini 40% lægri, enn teir eru nú.

Verða allir prísir lækkaðar 40% yvir ein kamb, fer tað at merkja, at ein vanligur ferðaseðil við Smyril fer úr 75 krónum, niður í einar 45 krónur og ein ferðaseðil til bil fer úr 130 krónum, niður í einar 80 krónur.

Men her kann tað enda við, at vanligir ferðaseðlar ikki fara at lække so nógv, men at tað afturfyri fer at verða munandi bíligari at keypa tíggju-túrakort.

Ein annar spurningur er, hvussu nógv fólk skulu kunna vera í einum bili, uttan at tað kostar eyka.

- Hetta eru nakrir av spurningunum, sum vit tosa um í samgonguni í løtuni, sigur Jacob Vestergaard.

---

# Nú skulu roykjarar út í kuldan-ella halda seg heima

*Endamálið er ikki at raka tey, sum roykja. Endamálið er at verja øll tey, sum ikki roykja og at tryggja teimum rættin til roykfría luft, sum er eitt tað heilsuskaðiligasta, sum er*



**- Endamálið er at verja tey, sum ikki roykja og at tryggja teimum rætt til eitt roykfrítt umhvørvi, bæði á arbeiðsplássinum, á matstovum og barrum, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður**

ROYKIPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hans Pauli Strøm ætlar sær nú rættiliga í hernað fyri at verja øll tey mongu, sum ikki roykja.

Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin nú tosað við landsstýrið um at seta forboð fyri at roykja, allastaðni, har fólk koma saman á almennum støðum.

- Gongur, sum eg vil, verður bannað at roykja allastaðni, uttan heima og uttandura frá 1. januar, 2008, sigur Hans Pauli Strøm.

Men hann viðgongur, at enn er langt á mál og tí veit hann ikki um tað lukkast.

Málið er nú reist í landsstýrinum og har er full undirtøka fyri tí. Men nú skal tað so gjøgnumarbeiðast politiskt, eins og tað skal sendast til hoyringar hjá teimum pørtum, sum hetta ávirkar og so fáa vit at síggja.

Hann ásannar, at hetta er eitt tiltak, sum fer at raka roykjarar hart.

- Men endamálið við hesum er eina og aleina at tryggja øllum teimum, sum ikki roykja, rættin til eitt roykfrítt umhvørvi og rættin til at sleppa undan tubbaksluft, sum er eitt tað skaðiligasta sum er.

- Endamálið er eisini gera tað so torført at roykja, at tað skal forða fyri, at fleiri yvirhøvur fara at roykja.

**Skulu ikki vera eftirbátar**

Hann vísir á, at áður er tað gjørt ólógligt at roykja á almennum arbeiðsplássum.

- Tí er tað mótstríðandi, at tað skal vera loyvt at roykja á øllum øðrum arbeiðsplássum, sigur hann.

Men hann heldur eisini, at føroyingar eiga ikki at vera eftirbátar á hesum øki og hann vísir á, at fleiri lond hava sett forboð fyri royking í almenna rúminum.

- Tí haldi eg eisini, at tað í Føroyum eigur at verða bannað at roykja í allastaðni, har fólk koma saman, bæði til arbeiðs og til undirhalds og tað bæði á privatum og á almennum støðum

Hans Pauli Strøm mælir tí til at tað verður bannað at roykja á øllum arbeiðsplássum, bæði privatum og almennum.

Men hann mælir eisini til, at hetta forboðið verður galdandi har fólk kom saman til undirhald, til mentanartiltøk og til frítíðarítriv, tað verið seg á matstovum, á barrum, á pubbum, á dansistøðum, konserthølum, og alla aðrastaðni við.

Hin vil hann eisini hava við í lógina, at tey, sum selja sigarettir og tubbak, skulu ikki hava loyvi at hava hetta standandi frammi á sjónligum staði.

- Í løtuni er ólógligt at hava sigarettir á sølufremjandi staði, men tað er so ógreitt, hvat tað merkir, at fútin sær seg ikki føran fyri at hava eftirlit við tí, sigur Hans Pauli Strøm